# Hoyringsskriv

í sambandi við uppskot til

## *Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (veiðigjaldslógin)*

## Veiðigjøld Barentshavið og heimaflotin




**Nýggi Gadus kemur til landið í mai 2023 – øll veiðan verður gagnnýtt.**

**Viðmerkingar frá:**
**JFK Trol P/F**
**FO-700 Klaksvík**

**Veiðigjøld Barentshavið**:

Vit eru altíð tilreiðar at koma á fund við nevndina, fyri at greiða nærri frá okkara viðmerkingum til lógaruppskotið.

Niðanfyri fara vit at viðgera og grundgeva fyri hesum punktum:

1 Tilfeingisgjaldið í Barentshavinum er uttan iva sett ov høgt.

a. At fiska í Barentshavinum gevur eina meirinntøku til føroyska landskassan upp á 36,5 mió. kr. við einum veiðigjaldi upp á kr. 1,08 pr. kg.

b. At fiska í Barentshavinum gevur eina meirinntøku til føroyska landskassan upp á 52,4 mió. kr. við einum veiðigjaldi upp á 2,16 kr. pr. kg.

c. Veiðigjaldið fyri botnfisk í Barentshavinum hækkar 140% í 2026 við støði í miðalprísinum fyri 2022 uppá 21,50 kr/kg.

d. Endurnýgging av skipunum í Barentshavinum er í samsvari við tær ætlanir, sum landsstýrið hevur, at øll veiða skal gagnnýtast og koma í land – *Alt í land.* Tó vil landi seta hesar íløgur í vanda.

e. Hækking av veiðigjaldinum tekur grundarlagið undan teimum nýíløgum, sum nú eru ávegis í Barentshavinum. - íløgurnar eru gjørdar undir teimum fyritreytum, sum vóru galdandi tá sáttmálarnir um nýbygging vórðu undirskrivaðir. Ein hækking av tilfeingisgjaldinum á yvir 100% hevur tí alvorliga ávirkan.

f. Heimaflotin: Eykakostnaður hjá JFK upp á 9 mió. kr.

Í viðmerkingunum til uppskotið stendur fylgjandi:

> *Hækking av gjaldinum fyri botnfisk í Barentshavinum*
> *Fyri at Føroyar kunnu fiska í russiska partinum av Barentshavinum, lata Føroyar Russlandi uppsjóvarfisk í Føroyskum sjógvi. Ført hevur verið fram, at veiðigjaldið, sum Føroyar í dag fáa fyri fiskiskap í russiska partinum av Barentshavinum, er nógv minni enn tað, sum Føroyar høvdu fingið, um vit ikki lótu uppsjóvarfisk til Russland. Tí verður mett rímuligt, at veiðigjaldið í barentshavinum hækkar.*

Frammanfyristandandi er ikki í trá við tær meginreglur, sum hava verið galdandi í sambandi við áseting av veiðigjaldi til einstøku skipabólkarnar.

Tað er ikki rætt, at tilfeingisgjaldið í Barentshavinum verður ásett eftir, hvat møgulig býtiskvota gevur í veiðigjaldi í Føroyum, men endamálið eigur at vera, hvat veiðan hjá skipabólkinum kann gjalda.

Grundarlagið undir tilfeingisrentuni er at tann yvirnormali vinningurin, sum vinnan fær burturúr rættindunum, sum verða útskrivað til vinnuna, skal fella í landskassan. Tí má útgangsstøði takast í

heildini, tvs, øllum teimum viðurskiftum, sum gera seg galdandi og ikki bara sjálvt gjaldið á tær nøgdir, sum verða veiddar, men eisini hvørji onnur gjøld og skattur kemur í Landskassan. M.a. orsaka av at manningarnar á Barentshavsflotanum fáa nógv størri hýruprosent og eru nógv fleiri í tali, rinda hesir, sum víst verður á niðanfyri, nógv meira í landskassan enn um talan var um at fiska hendan uppisjóvarfisk sjálvi. Tí er yvirnormali vinningurin eisini lægri fyri hesa vinnu, samstundis, sum landskassin fær meira í inntøku.

**Ad: a**

Tað er áður ført fram, at býtishandlin við Russland hevði givið betur avkast til Landskassan, um Føroyar fiskaði kvotuna sjálvi. Hetta uppáhald er ikki rætt, tá hædd verður tikið fyri bæði tilfeingisgjaldi og lønarskatti.

Við grundarlagi í kvotunum fyri 2022 í russiska partinum av Barentshavinum, hava vit kannað eftir, hvør munurin er í sambandi við inngjaldið til landskassan, um Føroyar veiða býtisfiskin, ella hesin verður umbýttur við Russland.

Grundarlagið undir hesum útrokningum er, sum nevnt, kvoturnar fyri árið 2022 og teir miðalprísir, sum tá vóru galdandi og veiðigjøldini upp á kr. 1,08 pr. kg. fyri fiskin í Barentshavinum og galdandi veiðigjøld fyri pelagisku fiskasløgini.

Hetta eru tvær ólíkar fiskivinnur, sum als ikki hava sama býtisprosent til hýruna í mun til søluna, eins og manningartalið umborð er heilt annarleiðis.

Tískil kann ein ikki javnseta útrokning av veiðigjaldinum millum hesar bólkar, men ein má eisini kanna eftir, hvussu stórar hýrurnar eru hjá hesum ymisku skipabólkunum, og hvussu nógv kemur í landskassan umvegis lønarskatt.

Við atliti til hetta, vísa útrokningarnar, at Barentshavið við galdandi veiðigjaldi upp á kr. 1,08 pr. kg. gevur 36,5 mió. kr. meira í landskassan ella stutt lýst soleiðis:

| | |
|---|---|
| Inntøka til samfelagið frá fiskiskapinum í Russlandi | 122.872 |
| Inntøka til samfelagið um vit fiskaðu sjálvi | 86.395 |
| **Munur á sáttmálum áðrenn partafelagsskatt** | **36.477** |

Niðanfyri er sundurgreinað, hvussu komið verður fram til hesi tøl:

| Fiskaslag | Tons | Fiska-prísur | Sølu-virði | Tilfeingis-gjald pr. kg. | Tilfeingis-gjald íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 15.356 | 28,95 | 444.556 | 1,08 | -16.584 |
| Hýsa | 1.343 | 19,13 | 25.692 | 1,08 | -1.450 |
| Flatfiskur | 900 | 10,00 | 9.000 | 1,08 | -972 |
| Rækjur | 2.500 | 28,00 | 70.000 | | 0 |
| Íalt | **20.099** | | **549.248** | | **-19.007** |
| Mett hýra 40 % av søluvirði | 40% | | **-219.699** | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Gjald til samfelagið áðrenn partafelgsskatt:** | | |
| Skattur av hýru | 45% | -98.865 |
| Uppboðssølugjald av keypskvotu | | -5.000 |
| Tilfeingisgjald | | -19.007 |
| **Gjald til samfelagið íalt** | | **-122.872** |

| Fiskaslag | Tons | Fiska-prísur | Sølu-virði | Tilfeingis-gjald pr. kg. | Tilfeingis-gjald íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| **Russland í Føroyum:** | | | | | |
| Svartkjaftur | 75.000 | 2,15 | 161.250 | 0,31 | -23.250 |
| Makrelur | 13.300 | 6,78 | 90.174 | 1,23 | -16.359 |
| Sild | 9.200 | 4,82 | 44.344 | 0,89 | -8.188 |
| Royndarveiða | 500 | 0,00 | 0 | | 0 |
| | **98.000** | | **295.768** | | **-47.797** |
| Hýra mett 29% av søluvirði | 29% | | **-85.773** | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Gjald til samfelagið áðrenn partafelgsskatt:** | | |
| Skattur av hýru | 45% | -38.598 |
| Tilfeingisgjald | | -47.797 |
| **Gjald til samfelagið íalt** | | **-86.395** |

Sum tað framgongur frammanfyri, hevur Barentshavsflotin nógv størri veiðivirði um samanlíknað verður við, at Føroyar veiða býtiskvotuna sjálvi.

Hetta viðførur, at tann skattur, sum kemur inn í landskassan av hýrunum Barentshavinum, er nógv størri enn tann partur, sum skatturin er av hýruni, sum kemur inn gjøgnum pelagiskt fiskarí.

Atlit mugu takast at hesum viðurskiftum, tá veiðigjaldið skal ásetast, tí størra hýran viðførur størri útreiðslur og minni úrslit til skipini. Men hon gevur hinvegin landinum hægri lønarskatt.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið verður sagt;
*Yvirskipað verður verandi skipan mett at virka væl. Skipanin er einføld, løtt at umsita og vinnan veit, hvat veiðigjaldið er, tá farið verður til fiskiskap.*

Hetta hevur vinnan ongantíð verið spurd um, og skipanin er ikki eftirmett. Hinvegin má skipanin eisini vera rættvís.

**Ad: b**
Veiðigjøldini í Barentshavinum skulu eftir uppskotinum hækkað við 100% upp á kr. 2,16 pr. kg.. Tó hækka gjøldini uppaftur meira í 2026, tá ið ein nýggj hækking er løgd inn í skipanina.

Niðanfyri er somu útrokningar sum undir punkt a, men eru veiðigjøldini sett til tær upphæddir, sum framganga í  uppskotinum.

Við atliti at hesum vísa útrokningarnar, at veiða í Barentshavinum gevur 52,4 mió. kr meira í landskassan, enn um pelagiska veiðan varð fiskað av føroyskum skipum - ella stutt lýst soleiðis:

| | |
|---|---|
| Inntøka til samfelagið frá fiskiskapinum í Russlandi | 141.878 |
| Inntøka til samfelagið um vit fiskaðu sjálvi | 89.454 |
| **Munur á sáttmálum áðrenn partafelagsskatt** | **52.425** |

Niðanfyri er sundurgreinað, hvussu komið verður fram til hesi tøl:

| Fiskaslag | Tons | Fiska-prísur | Sølu-virði | Tilfeingis-gjald pr. kg. | Tilfeingis-gjald íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 15.356 | 28,95 | 444.556 | 2,16 | -33.169 |
| Hýsa | 1.343 | 19,13 | 25.692 | 2,16 | -2.901 |
| Flatfiskur | 900 | 10,00 | 9.000 | 2,16 | -1.944 |
| Rækjur | 2.500 | 28,00 | 70.000 | | 0 |
| Íalt | **20.099** | | **549.248** | | **-38.014** |
| Mett hýra 40 % av søluvirði | 40% | | **-219.699** | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Gjald til samfelagið áðrenn partafelgsskatt:** | | |
| Skattur av hýru | 45% | -98.865 |
| Uppboðssølugjald av keypskvotu | | -5.000 |
| Tilfeingisgjald | | -38.014 |
| **Gjald til samfelagið íalt** | | **-141.878** |

| Fiskaslag | Tons | Fiska-prísur | Sølu-virði | Tilfeingis-gjald pr. kg. | Tilfeingis-gjald íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| **Russland í Føroyum:** | | | | | |
| Svartkjaftur | 75.000 | 2,15 | 161.250 | 0,31 | -23.250 |
| Makrelur | 13.300 | 6,78 | 90.174 | 1,46 | -19.418 |
| Sild | 9.200 | 4,82 | 44.344 | 0,89 | -8.188 |
| Royndarveiða | 500 | 0,00 | 0 | | 0 |
| | **98.000** | | **295.768** | | **-50.856** |
| Hýra mett 29% av søluvirði | 29% | | **-85.773** | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Gjald til samfelagið áðrenn partafelgsskatt:** | | |
| Skattur av hýru | 45% | -38.598 |
| Tilfeingisgjald | | -50.856 |
| **Gjald til samfelagið íalt** | | **-89.454** |

Viðmerkingarnar til hesa talvu eru tær somu, sum undir a.

**Ad c**:

Í lógaruppskotinum er eisini lagt upp til eina hækkan yvir ár, og eftir hesum verður veiðigjaldið fyri botnfisk í Barentshavinum hækka 140% í 2026 við støði í miðalprísinum fyri 2022 uppá 21,50 kr/kg. – talva úr lógaruppskotinum niðanfyri:

**Talva 3: botnfiskur**

| Fiskaprísur í kr./kg. | | veiðigjald |
|---|---|---|
| Frá og við | til | % |
| 0,00 | 13,50 | 2,0% |
| 13,50 | 14,00 | 3,0% |
| 14,00 | 14,50 | 4,0% |
| 14,50 | 15,00 | 5,0% |
| 15,00 | 15,50 | 5,5% |
| 15,50 | 16,00 | 6,0% |
| 16,00 | 16,50 | 6,5% |
| 16,50 | 17,00 | 7,0% |
| 17,00 | 17,50 | 7,5% |
| 17,50 | 18,00 | 8,0% |
| 18,00 | 18,50 | 8,5% |
| 18,50 | 19,00 | 9,0% |
| 19,00 | 19,50 | 9,5% |
| 19,50 | 20,00 | 10,0% |
| 20,00 | 20,50 | 10,5% |
| 20,50 | 21,00 | 11,0% |
| 21,00 | 21,50 | 11,5% |
| 21,50 | 22,00 | 12,0% |
| 22,00 | 22,50 | 12,5% |
| 22,50 | 23,00 | 13,0% |
| 23,00 | 23,50 | 13,5% |
| 23,50 | 24,00 | 14,0% |
| 24,00 | 24,50 | 14,5% |
| 24,50 | 25,00 | 15,0% |
| 25,00 | 25,50 | 15,5% |
| 25,50 | | 16,0% |

**Ad: d**

Sum kunnugt er allur botnfiskaflotin í Barentshavinum undir endurnýgging. Talan er um samlaðar íløgur á áleið 1.200 mió. kr. Akraberg er komin, meðan Emerald og Gadus koma í vár. Tó hevur hetta uppskotið sett hesar íløgur í beinleiðis vanda.

Endurnýggingin av øllum trimum skipunum er gjørd við fyritreytunum um *Alt í land* – tað vil siga, at alt verður tikið umborð og ført til lands sum flak, H/G, mjøl, ensilaga ella lýsi. Hetta er eitt stórt frambrot í føroyskari fiskivinnu og fyri verksmiðjuskipini í Barentshavinum.

Leingi hevur verið ætlanin at endurnýggja skipini, men fíggingarstovnarnir vóru ikki sinnaðir at fíggja føroysku fiskivinnuna so leingi, sum veiðiloyvini ikki vóru langtíðarloyvi. Hetta var ein stór forðing í mong ár.

Ikki fyrr enn at lógin varð broytt soleiðis, at fiskiloyvini fingu eina loyvistíð upp á 12 ár og uppboðssølan varð tikin av, var møguligt at fáa fígging.

Samlaða EBITDA fyri botnfiskaskipini hevur verið millum 100 – 110 mió. kr. seinastu árini.

Mett verður at rentur og avdráttir av nýggju skipunum verður umleið 90 mió. kr., og við eyka veiðigjaldinum um 25 mió. kr., sum nú verður lagt á skipini í Barentshavinum, verður ikki nógv, fyri ikki at siga einki, eftir á botnlinjuni. Hetta kann ikki vera endamálið við veiðigjøldum.

**Ad: d**

JFK Trol skrivaði undir sáttmála seinast í 2019, og tá var tilfeingisgjaldið kr. 0,50 pr. kg. Samlað skuldi JFK Trol tá gjalda umleið 10 mió. kr. í kvotagjaldi og uppboðssølugjaldi. Hetta svaraði til umleið 50% av árligu rentu- og avdráttunum fyri nýggja skipið.

Síðani er rentustøðið hækkað munandi eins og oljuprísurin er hækkaður nógv. Hetta ger raksturin munandi tyngri.

Við nýggju veiðigjøldunum, sum sambært uppskotinum koma í gildi í 2023, kemur JFK Trol at gjalda upp móti 25 mió. kr. íroknað avgjald av uppboðssølukvotuni.

Hetta er ein hækking upp á 15 mió. kr., í mun til tá sáttmálin var undirskrivaður í 2019. Tá ið gjøldini aftur hækka í 2026 gerst hendan støðan uppaftur verri fyri skipini.

Hækkaðu renturnar og hækkaða veiðigjaldið eru tískil omanfyri 20 mió. kr. í mun til 2019.

Hetta tekur grundarlagið undan hesi nýíløgu, og tí vilja vit mæla til, at nýggja gjaldið ikki verður gjøgnumført í hesum ótryggu tíðum, vit liva undir í løtuni. Uppskotið eigur tí at verða tikið aftur.

Fíggjarmálaráðið skrivar soleiðis í viðmerkingunum undir *Avleiðingar fyri vinnuna:*

*Tað, at gjøldini hækka, so at størri partur av tilfeingisrentuni fellur til landið, ger at kravið til vinnuna um effektivitet og góð veiðitól økist. So hóast uppskotið viðførir ein fíggjarligan kostnað fyri vinnuna, vil tað ikki steðga vinnuni í at gera skilagóðar íløgur. Heldur tvørturímóti*

Barentshavið hevur gjørt íløgur í veiðitól, og verða hesi nøkur av teimum effektivastu skipunum, vit koma at hava í føroyska flotanum, nú hesin verður endurnýggjaður. Tann skilagóða íløgan er gjørd, og til dømis, er tað flak, sum verður framleitt umborð á Gadus. Hetta er tað flakið, sum er prísásetandi í Onglandi og hevur bestu góðsku og umdømi.

Fremstu Fish and Chips fyritøkurnar og fleiri av teimum, sum vinna árligu kappingina um besta fish and chips í Ongland nýta hesa framleiðsluna frá føroysku manningini.

**Ad: e**
Ætlanin er eisini at gera broytingar í viðurskiftinum í sambandi við línuskipini og partrolararnar, har veiðigjald nú eftir ætlan verður lagt á makrelkvoturnar hjá teimum.

Við støði í makrelkvotunum, sum línuskipini og partrolararnir fingu í 2022, kemur hetta at viðføra eina eyka útreiðslu upp á umleið 9 mió. kr. í JFK konsernini.

JFK hevur altíð latið manningarnar á línuskipunum og partrolarunum makrelpengar eftir býtinum 40% til fiskandi skipið, meðan restin er farin til manningarnar á nevndu skipum við tí býtisprosentið, sum er fyri línuskip og partrolarar.

Henda hýra hevur verið ein kærkomin upphædd hjá manningini, sum ikki hevur tær hægstu árligu lønirnar, eins og hetta hevur verið eitt týðandi ískoyti hjá skipunum í teirra dagliga rakstri, soleiðis at tey hava kunnað hildið áfram at latið rávøru til Kósina og tey 150 fólkini, sum har virðisøkja botnfiskin undan Føroyum.

Tað er tí av alstórum týdningi, at hesin makrelur verður verandi hjá hesum skipum.

Best hevði verið, um størri nøgd varð latin til partrolararnar, soleiðis at teir kundu fingið sær eitt grundarlag fyri útskifting, og á tann hátt fiskað makrelin sjálvir.

Klaksvík hin 15. mars 2023

J. F. K. Trol P/F

________________________

Hanus Hansen, stjóri

Telefon 55 54 60

Teldupostur: hanus@jfk.fo